FALDARI 5

# 2016 H71 2017

## HEIMA Í HOYVÍK



FTZ DEILDIN

## H71 v TEAM KLAKSVÍK

**HOYVÍKSHØLLIN** MIKUDAGIN **14. DESEMBER** 2016 **KL. 20.00**

Auto Service
BONUS er biligari!
J&K
TRYGD
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

ODDAGREIN:

# LIVST SO SPYRST

## UNDANFARNA HONDBÓLTSVIKUSKIFTIÐ VAR AFTUR MERKT AV LANDSLIÐSLEIKI

Føroyar var soleiðis vertur fyri HM-undankapping innan kvinnuhondbólt, har Ísland, Eysturríki, Makedonia og Føroyar dystaðust um at koma víðari til HM-endaspælið. Hóast føroyska landsliðið var munandi darvað av skaðum hjá lyklaleikarum, so lá parturin hjá eftirverandi partinum av hópinum sanniliga ikki eftir. Fyrst leiktu vit ímóti Makedonia og taptu tepurt 21 - 19, eftir hálvleiksstøðuna 8 - 8. Serliga verjuparturin var góður hjá føroyska liðinum og kundi vit eins væl vunnið dystin. Næsti dysturin var ímóti Íslandi og taptu vit eisini henda, tó nakað størri, tá endaliga úrslitið gjørdist 24 - 15. Verjuparturin í hesum dysti var eisini í lagi, men í álopinum, varð alt ov nógv brent. Var eitt sindur neyvari leikt í álopspartinum og skorað meiri uppá upplagdar møguleikar, so hevði sæð munandi betur út, hóast sannast má, at íslendska liðið var nakað sterkari enn okkara. Seinasti dysturin var sunnudagin ímóti Eysturríki, har vit eisini løgdu rygg til eitt tap, hesi ferð á 29 - 20. Hesin dystur var í mangar mátar meinlíkur dystinum ímóti Íslandi, raskar í verjuni, men ov veikar í álopinum.

Spurningurin er so hvussu slíkt vertskap hilnaðist og hvat liggur eftir nú undankappingin er lokin. Leikliga er einki at ivast í, at nógv er fingið burturúr og er tað sjálvsagt høvuðsendamálið við slíkari luttøku. Men einki er heldur at ivast í, at vit umsitingarliga hava fingið nógv burtur úr eisini. At fyriskipa slíkari kapping, krevur nógva og drúgva fyrireiking, har nógvir endar skulu bindast upp og viðurskifti avgreiðast. Og sum skilst, eru fyrireikararnir væl nøgdir við kappingina og hvussu alt spældi av.

Eisini hevur ein varhugan av, at føroyski almenningurin er farin at geva hondbóltinum meiri gætur aftur. Sum skilst á fólki innan vinnulívið, so eru teir ikki sørt imponeraðir av tí landsliðsarbeiði, ið nú fer fram innan HSF og tær ambitiøsu ætlanir lagdar eru fyri framtíðina innan føroyska hondbólslandsheimin og tað arbeiði, ið verður útint í tí sambandi. Og í slíkum liggur kanska største fongurin fyri føroyskan hondbólt, við at skipa fyri slíkari kapping. Lýsingarvirðið á føroyska hondbóltinum hækkar og merkir hetta meiri pening at arbeiða við. Uttan pening, einki landsliðsarbeiði og fáa vit nógvan pening at arbeiða við og verður rætt atborið, so er eingin ivi í, at verandi landsliðsætlan og landsliðsarbeiði flytur føroyskan hondbólt langt fram á leið.

Hvat viðvíkur H71 og tað kvinnulandslið, ið umboðaði Føroyar í kappingini, so mugu vit enn sanna, at okkara arbeiði framvegis liggur innan fyrireiking og umsiting av kappingum í kvinnulandsliðshøpi. Á leikvøllum hava vit enn ongan leikara fingið á kvinnulandsliðið. Men tekin eru tó í sól og mána um, at vit kunnu vóna, ikki innan alt ov leingi at hava umboð millum leikararnar á føroyska kvinnulandsliðnum – livst so spyrst.



**Anna Dam**
forkvinna,
tel. 519082


**Bergtóra Høgnadóttir**
næstforkv., tel. 286011


**Ann-Mari B. Mouritsen**
tel. 214452


**Emy Sólvitsdóttir**
tel. 513769


**René Dahl Olesen**
tel. 235930


**Janet Fríða Johannesen**
tel. 212211


**Símun Poulsen**
tel. 517220


**Erland Jensen**
tel. 243534



**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo **FALDARI 3 2016-17**

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Bergtóra Høgnadóttir
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent





# Heildar-ráðgeving, ið ger mun

Okkara mál er at veita tær ráðgeving, ið kemur allan vegin runt um tíni viðurskifti. Ráðgeving, ið er snikkað til júst tín tørv, soleiðis at tú kanst brúka tíðina til tað, ið hevur týdning fyri teg. Ráðgeving, ið veitir tær eitt gott yvirlit og gevur tær fíggjarligt rásarúm í gerandisdegnum. Við øðrum orðum; ráðgeving, ið gevur meining.

Ynskir tú ta bestu ráðgevingina?

**Bílegg fund á www.banknordik.fo/nordik360**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

SENDISTOVAN

**H71**
ynskir øllum
eini gleðilig jól

# *Studlajól*

## í Hoyvíkshøllini
## 21. des. kl.17.00



Jólahaldið verður í Hoyvíkshøllini mikudagin tann 21. desember 2016 frá kl. 17 til umleið kl. 20.00.
Frá kl. 17 og umleið ein tíma fram verður ein hugnaløta, har vit fara at dansa um jólatræið. Vit fáa jólamenn á vitjan við pakkum til børnini og borðreitt verður við kaffi, te, smurdum breyði og køkum. Hvør familja verður biðin um at hava eitt fat av smurdum breyði ella líknandi við.
Aftaná hugnaløtuna verða hondbóltsdystir, har nøkur av yngru liðunum fara at spæla hondbólt ímóti foreldrum.
Systkin, foreldur, ommur, abbar og onnur eru sjálvandi vælkomin við.
Vit vóna at síggja nógv fólk í høllini.
Vaksin og børn skulu vera í ítróttarskóm og klár til ein dyst um neyðugt.
Við ynski um eini gleðilig jól og eitt gott nýttár.

Heilsan
H 71 Stuðlar

**H71**

Loysnir tel 214452


XL BYG
TÓRSHAVN
DEWALT
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO


Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRÁ REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in fært tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen





trygging.fo

# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



©NUDLAVIRKIÐ

# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

## - vit hava keyparar, ið bíða

Niels F[illegible]a 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

INNI

# H71 KLÆÐINI 2016/17



## Sweat
Børn: 399-
Vaksin: 449,-

## Jacket
Børn: 449,-
Vaksin: 499,-

## Pants
Børn: 399,-
Vaksin: 449,-

H71 INTERSPORT Thomas Dam ítróttur adidas

# HVUSSU VORÐIN ERT TÚ?

**„TESTIN HEVUR FINGIÐ MEG AT ROYNA OKKURT HEILT NÝTT, SUM EG ANNARS IKKI FYRR HAVI HUGSAÐ UM!" SIGUR LEIKARI, NÚ NAKRAR VIKUR EFTIR GARUDAPRÁT OKKARA**

Í H71 hava vit á fyrsta sinni gagnnýtt sonevndar Garuda hondbóltsprofilar. Nú kappingarárið byrjaði, avgjørdu vit, at allir leikarar á besta mansliðnum skuldu fáa møguleikan at svara einari sonevndari 'persónligheitstest'.

Nýggi venjarin Sonni Larsen og nevndarlimurin Bergtóra Høgnadóttir eru bæði sertifiseraði til at nýta amboðið og høvdu hug at fara í holt við uppgávuna. Sonni er vanur at gagnnýta amboðið í hondbólsthøpi sum venjari, meðan Bergtóra er von at brúka amboðið í gerandisarbeiði sínum innan HR-økið. Aðrastaðni verða hesar testirnar nógv brúktar innan hondbóltsøki – Ulrik Wilbek er ein teirra ið gagnnýtir hesar testir í stóran mun – hann hevur enntá skrivað eina bók, sum í stóran mun snýr seg um hetta við hondbóltsprofilum. Um tú kundi hugsað tær at lisið hana, so eitur hon: *Tro på dig selv*.

Vælvitandi at leikarar okkara hava nógvar styrkir, var endamálið, at finna út av, júst hvørjar serstøku styrkirnar hjá hvørjum einasta leikara vóru. Og kanska læra nakað um, hvør spælir best undir hvørjum umstøðum. Men eisini var endamálið at gera leikararnar tilvitaðir um dygdirnar hjá hvørjum øðrum, og hvussu hesar koma best í spæl.

Á einum leikarafundi kunnaðu vit leikararnar um amboðið. Hóast tað kann vera eitt sindur persónligt við slíkum testum, so er sjálvsagt eisini umráðandi at leikarir fáa at vita sum





er: Nevniliga, at ein slík test sigur nakað um, hvussu menska teirra er á vøllinum – í dysti og tá teir eru undir pressi – men hon sigur ikki nakað um sjálvan persónin í gerandisdegnum. Hann – Finn Haveleschka – sum hevur ment amboðið orðar seg soleiðis: Tú kanst ikki broyta persónligheit, men tú kanst broyta atferð! Tað merkir, at um ein leikari gerst varugur við, hvussu og nær, hann spælir á ein ávísan hátt, so kann hann eitt nú við Garudatilvitaninia fáa amboð og førleikar til at avgera, um tað stundum kann loysa seg at gera okkurt á ein heldur øðrvísi hátt. Leikarin kann broyta atferðina. Tað sum eisini er so gott við amboðnum er, at leikarin eisini lærir nakað um sínar styrkir. Eingin menska er meiri røtt ella skeiv – men um eitt lið hevur nógvar ymiskar litir, ja so er liðið væl á veg. Heilt stutt kann nevnast, at í Garuda hondbóltsprofilinum eru fýra litir – leikarar kunnu vera: bláir, grønir, reyðir og gjári. Flestu okkara hava tveir litir sum eru markantir. Stuttligt er at síggja, hvussu litirnir eru umboðaðir á liðnum. Tá vit nevndu, hvat eyðkendi ymsu litirnar fyri leikarunum, flentu teir. Søgdu ymisk nøvn og sipaðu til ymiskar støður. Tí víst kendu teir væl menn aftur í ymsu litunum! Ein leikari orðar seg soleiðis: Garuda er eitt frálíkt amboð til ymisk ting. Til dømis at síggja munin á, hvussu ein sjálvur uppfatar tingini, og hvussu tað sær út á pappíri.

***...framhald á síðu 16***

AnniJanni

FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika
- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanka** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja deildina í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR SPARIKASSI




***Hendan myndin lýsir væl, at dygdir okkara eru ymiskar – vit eru ikki øll líka góð til alt, men øll hava vit nakrar styrkir.***



Sjálvur sá eg meg heilt væl aftur í úrslitinum, men eg visti ikki, at eg var so reyður!

og síðani vóru testirnar sendar teimum. Teir fingu at vita, at tað ikki var eitt krav at teir svaraðu – tað var upp til teirra. Men allir sum ein svaraðu testini! Og eftir hetta høvdu Sonni og Bergtóra samrøður við leikararnar – ein og ein. Í samrøðuni lýstu vit fyri teimum, hvat testin segði, tosaðu um, um teir kendu seg aftur og funnu saman til støður á vøllinum, sum vóru í trá við testina. Eisini var tosað um, hvussu menn handfóru støður, tá teir vóru pressaðir – og royndu saman at tosa um, hvussu leikarin kanska kundi handfara ávísar støður enn meiri konstruktivt. Men sjálvsagt fekk tann parturin, har vit tosaðu um dygdirnar hjá leikaranum og hvussu og nær hesar komu best í spæl mest rúmd. Nógv meir verður at frætta um Garuda í næsta faldara, tí har verður grein, har Bergtóra tosar við Sonna um Garuda úr einum venjara sjónarhorni.

Hvussu vorðnir eru leikararnir á besta mansliði okkara eru? Vit hava allar ælabogans litir í H71!



# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN




# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

"Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest"

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ
Better in the long run







# VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI

Alt til *HITA SANITET & VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000








...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

PETUR MITTÚN
LEIKARAMENNARI

# LEIKARAMENNINGIN HJÁ HSF



*Mynd: Petur Mittún*

**BLEIV SPURDUR UM EG KUNDI SKRIVA NAKRAR LINJUR TIL DYSTARBLAÐIÐ HJÁ H71, UM LEIKARAMENNINGINA HJÁ HSF. SJÁLVANDI, VAR MÍN FYRSTI TANKI. TAÐ ER UMRÁÐANDI FYRI HSF, AT VIT FÁA KUNNAÐ UM ARBEIÐIÐ SUM FER FRAM, EISINI HJÁ TEIMUM YNGRU LEIKARUNUM**

Hetta er 4 árið at skipaða leikaramenningin er í gongd. Leikaramenningin er eitt neyðugt tiltak um vit skulu flyta føroyska hondbólt fram á leið. Leikaramenningin er leypandi blivin tillagað, soleiðis at hendan samsvarar tí menning sum arbeiðið hjá HSF fer í gjøgnum.

Ein av broytingunum er heiti leikaramenning. Tá ið byrjað bleiv fyri 4 árum síðandi var heiti talentmenning. Hetta kann tykjast at vera ein lítil broyting, men ynski um broytingina skal síggjast í mun til, at HSF ynskir at menna so nógvar leikarar sum møguligt, og ikki einans tey sum, tá ið tey eru millum 12-14 ár eru tey størstu talentini. Hetta tí at tað er ein sannroynd, at tað nærum er ómøguligt, tá ið leikararnir eru 12-14 ár, at siga hvørjir leikarar verða teir, sum fara allan vegin og blíva A-landsliðspælarar.

Leikaramenningnin fevnir um aldursbólkarnar U12, U13, U14 og U16 (gentur og dreingir). Í alt hava upp ímóti 300 leikarar luttikið. Hetta er eitt rættuliga stórt tal, og skal síggjast í ljósinum av ynskinum um, at so nógvir leikarar sum møguligt sleppa at luttaka í leikaramenningini. Í praksis fer hetta fram við, at allir leikarar ikki eru til hvørja venjing, men td. aðru hvørja venjing. Tess yngri leikararnir eru, tess størri er hópurin. Í U12 er samlkaði hópurin millum 45-50 leikarar. Til hvørja venjing verða 36 leikarar boðsendir.

Fyri at luttaka í leikaramenningini hevur HSF sett nøkur krøv til leikararnar. Hesi eru umframt grundleggjandi hondbóltsførleikar, hugburður, arbeiðssemi og ídni. Vit grundleggjandi hondbóltsførleikar meinast við, at leikararnir sjálv-

*...framhald á síðu 26*





sagt skulu duga at lofta og kasta, men eisini at leikararnir hava grundleggjandi motorisku førleikarnar uppá pláss, soleiðis at teir ma. duga at renna og lofta/kasta samstundis. Krøvini til grundleggjandi hondbóltsførleikarnar økjast sjálvsagt eldri spælarnir blíva. Við hugburð, arbeiðssemi og ídni meinast við, at einstaki leikarin møtir upp til sínar venjingar úti í felagnum og arbeiðir hart til hvørja venjing, tí tað er úti í feløgnum og í samband við dagligu venjingarnar, at tann stórsta menningin fer fram.



Karmarnir fyri leikaramenningin er Hin føroyski leisturin. Hin føroyski leisturin lýsir umvegis læruætlanir, hvat einstaki leikarin eigur at duga, tá ið hann td. er 14 ára gamal. Leisturin er skrivaður av Dia Midjord og Birgir Hansen, og hevur verið til hoyringar internt í HSF og hjá ymisku feløgunum. Uttan at fara í smálutir við føroyska leistinum, kann stutt staðfestast, at hondbóltsvenjing hjá børnum og ungum í størst møguligan mun eigur at verða við bólti, eins og leikarar skulu eggjast til at taka egnar avgerðir.

Leikaramenningin er bygd upp umvegis mánaðarligar venjingar og hondbóltsnám. Í alt eru 9 mánaðarligar venjingar í kappingarárinum 16/17. Her eru hondbóltsnámini eisini tikin við. Vanligu venjingarnar eru 2 venjingar yvir eitt vikuskifti, td. fríggja- og sunnudag. Námini eru bygd upp sum venjingar í ein heilan dag ella yvir 2 dagar. Tá eru betri stundir til at seta á fokus á venjingar, sum ikki eru møguligar í samband við vanligu venjingarnar. Hetta kann eisini verða venjingar uttan fyri sjálvan vøllin.

Inntil víðari hava tríggjar leikaramenningar verið, eins og eg havi sæð eitt ótal av leikarum í dysti, tá ið landskappingardystir hava verið. Staðfestast kann, at vit hava sera nógvar dugnaligar og arbeiðssamar leikarar, bæði á gentu og dreingja síðuni. Við rætta hugburðinum og viljanum til at venja nógv og rætt, kunnu hesi koma langt á hondbóltsleiðini, og um 5-10 ár verða grundstuðlar á okkara ymisku landsliðum, sum tá sjálvandi hava kvalificerað seg til ymisku endaspølini.



*Myndir: Petur Mittún*


HANDLA
Ein heimur fyri seg av
tilfari til skapandi sálir
01
GLOSSY
www.handla.fo



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

## ANNA ELISABETH HALSDÓTTUR WEYHE

G12
(11 ÁR)



**Hvørjum plássi spælur tú á?**
– Miðja ella vongur.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
– Tað minnist eg ikki.

**Hvør er tín stórsta hondbóltsfyrimynd?**
– Systir mín Maria Weyhe og allir mínir mammubeiggjar í KÍF.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
– Nei.

**Hvat er tann besti sangurin at lurta eftir áðrenn dyst?**
– Havi ongan ávísan sang.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
– Tá vit vunnu steypakappingina í G10 og so sjálvandi Partille Cup.

**Hvat vilt tú verða tá, tú verður stór?**
– Hevði væl tímað at verðið professionellur hondbóltsspælari.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
– Í steypafinaluni skuldi eg taka straffi, men eg dribblaði aftaná at dómarin hevði floytað, so málið bleiv kolldømt. Og tað var javnleikur tá.

**Hvat er tað allar besta við at spæla hondbólt?**
– Stuttligt og spennandi spæl.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
– Genturnar á mínum hava tað ordliga stuttligt saman.

**Hvønn skal eg spyrja næst?**
– Karinu Debes Heinesen í G12.

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.

Fríða Patursson, adv.

Óla Jákup Kristoffersen, adv.

Christian Andreasen, adv.

Niels Winther Poulsen, adv.

Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!




NORÐOYA SPARIKASSI

# Orkulán 2,5%

*- Bústaðarlán við lágari rentu*

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

**Gullpakkin við keypi av nýggjum bili**

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og haraftur at allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

**Auto Service**
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com


Takk fyri
stuðulin
FLØSKU
INNSAVNAN
2. JANUAR
KL.17.00
H71 kemur eftir ætlan runt í húsini í Hoyvík mánadagin 2. januar 2017 eftir kl. 17.00 .Um tit hava fløskur at lata, so taka vit fegin ímóti teimum. Allur ágóðin fer til ungdómsarbeiðið hjá H71.
H71
Loysnir tel 214452

## H71

1 Ári E. **Dam**
16 Jens **á Skipagøtu**

4 Rúni Vest **Højgaard**
5 Bogi **Gaard Davidsen**
6 Leivur **Mortensen**
8 Pætur **Thomsen**
10 Vilhelm **Poulsen**
11 Hans Kári **Hansen**
14 Sigmundur **H. Dahl**
15 Sigmundur **Nolsøe**
18 Andor **Sivertsen**
22 Helgi **Hoydal**
23 Hilmar Leon **Jakobsen**
24 Niklas **Højgaard Hanusson**
45 Peter **Krogh**
73 Dánjal **Tórgarð**
89 Jónas **G. Djurhuus**
99 Tróndur **Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparvenjari:** Mark Lausen-Marcher
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska
**Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen

## TEAM KLAKSVÍK

12 Aron **Kallsberg Jacobsen**
16 Rasmus **Sommer Magnusson**

3 Hans Arni **B. Thomsen**
4 Dávid **L. Danielsen**
8 Dánjal **Kjærbo**
9 Birgir **Poulsen**
14 Martin **Joensen**
15 Beinir **Johannesen**
17 Aron **Garrdlykke Joensen**
18 Einar **Dam**
20 Finnur **Hansson**
22 Vilhelm **Vilhemsen**
23 Andrias **Ellingsgaard**
24 Sámal **á Tjaldrafløtti Olsen**
27 Petur Martin **Eliasen**
66 Hanus **Norðberg**
88 Jens Pauli **Mohr**

**Venjari:** Finnur Hansson
**Hjálparvenjari:** Heri Johnsson
**Liðleiðari:** Svein Rógvi Ljósstein Nielsen

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 18.09.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **36**-19 |
| 21.09.2016 | StÍF - **H71** | 23-**36** |
| 25.09.2016 | **H71** - Kyndil | **26**-19 |
| 06.10.2016 | Neistin - **H71** | 26-**23** |
| 08.10.2016 | KÍF - **H71** | 29-**23** |
| 16.10.2016 | **H71** - VÍF | **28**-17 |
| 23.10.2016 | Kyndil - H71 | 21-**29** |
| 26.10.2016 | Team Klaksvík - **H71** | 22-**29** |
| 30.10.2016 | **H71** - StÍF | **25**-25 |
| 09.11.2016 | **H71** - KÍF | **23**-22 |
| 13.11.2016 | **H71** - Neistin | **22**-20 |
| 27.11.2016 | **H71** - Kyndil | **24**-23 |
| 11.12.2016 | VÍF - **H71** | - |
| 14.12.2016 | **H71** - Team Klaksvík | - |
| 17.12.2016 | StÍF - **H71** | - |
| 26.02.2017 | **H71** - KÍF | - |
| 01.03.2017 | VÍF - **H71** | - |
| 08.03.2017 | Team Klaksvík - **H71** | - |
| 12.03.2017 | **H71** - StÍF | - |
| 19.03.2017 | **H71** - Neistin | - |
| 25.03.2017 | Kyndil - **H71** | - |
| 01.04.2017 | Neistin - **H71** | - |
| 09.04.2017 | **H71** - VÍF | - |
| 15.04.2017 | KÍF - **H71** | - |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **H71** | **12** | **324** | **266** | **58** | **19** |
| 2 | VÍF | 12 | 355 | 302 | 53 | 17 |
| 3 | Kyndil | 14 | 373 | 349 | 24 | 17 |
| 4 | KÍF | 12 | 315 | 295 | 20 | 16 |
| 5 | StÍF | 14 | 387 | 394 | -7 | 10 |
| 6 | Neistin | 12 | 291 | 303 | -12 | 10 |
| 7 | Team Klaksvík | 14 | 292 | 428 | -136 | 1 |

J&K

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

## J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT